


*Í nógum donskum heimum finnast hitapumpurnar. Serfrøðingar meta tó, at ikki allar standa mát við tað sum verður lovað keyparanum*

# Snýttir upp um bæði oyru

**HITAPUMPUR** - Danir, sum keypa bíligar hitapumpur í vøruhúsum ella byggibúðum, verða snýttir uppum bæði oyru. Tað heldur í øllum førum Lars Abel, sum er stjóri í áhugafelagnum Varmepumpefabrikanterne i Danmark. Hann kallar støðuna á marknaðinum "kaotiska", tí nógvar vánaligar og bíligar pumpur koma á marknaðin

Snorri Brend

**Danmark:** – Hitapumpurnar standa snøgt sagt ikki mát.

Tað staðfestir Michael Reuss, verkætlanarleiðari á Center for Energibesparelser (fyrr Elsparefonden). Hann er heldur ikki fegin um støðuna á marknaðinum:

– Reint anarki valdar á marknaðinum fyri smáu luft/luft-hitapumpurnar, ið verða seldar bíliga í handilsdeplum og byggibúðum. Hesar hitapumpurnar lúka eftir øllum at døma ikki tað, ið seljararnir siga, at tær gera, sigur hann sambært Ingeniøren, haðani sev.fo hevur fingið tíðindini.

Michael Reuss heldur ikki, at tað hjálpir brúkarunum serliga nógv, at tað á nýggjárinum verður lóg, at luft/luft-hitapumpur skulu vera A-merktar sum trygd fyri, hvussu nógv tær spara á elrokningini.

## Fupp

Í dag er støðan hon, at allir framleiðarar lýsa við, at pumpur teirra hava tað nógv eftirspurda A-merkið.

Men eitt stakroyndareftirlit, sum Center For Energibesparelser hevur gjørt vísir, at tað ikki veitir trygd fyri nøkrum sum helst.

– Vit hava tikið tríggjar tilvildarligar bíligar hitapumpur burturúr rúgvuni. Ongin av teimum hevði uppiborið A-merkið, sum tær bóru. Í øllum førum var talan um fupp.

> **Vit hava fleiri dømi um, at sama hitapumpa hevur heilt ymiskar eginleikar, alt eftir hvør seljarin er**

– Mest lemjandi dømið var ein A-merkt hitapumpa, sum í roynd og veru bert leyk krøvini fyri eini D-vøru, sigur Michael Reuss.

Lars Abel heldur tí lítið um støðuna á marknaðinum í dag. Hann kallar støðuna kaotiska, tí nógvar vánaligar, bíligar pumpur koma á marknaðin.

– Mongu klagurnar, sum vit hoyra frá bæði privatum og fyritøkum bera í sær, at øll vinnan fær ilt orð á seg, og tað ber als ikki til.

Bæði Lars Abel og Michael Reuss finnast tí harðliga at lyftunum hjá seljarunum um at hitapumpur teirra kunnu hita ávís tal á fermetrum upp, ofta upp til 150.

Slíkar útrokningar geva bert meining, um tú veitst fortreytirnar.

– Púra misvísandi og villleiðandi, sigur Michael Reuss. Og Lars Abel leggur aftrat:

– Vit hava fleiri dømi um, at sama hitapumpa hevur heilt ymiskar eginleikar, alt eftir hvør seljarin er!

## Stuðul frá veitarum

Teir báðir fáa undirtøku frá Jørgen K. Nielsen, stjóra í Dansk Energis Brancheforening, sum er áhugafelag hjá veitarum av upphitingarútgerð.

– Tað er óveruligt at kunna hita eina íbúð uppá 150 fermetrar upp við eini luft/luft-hitapumpu, sigur hann.

Sjálvt um hitapumpurnar lúka formligu krøvini fyri at fáa A-merkið, so avspeglar tað ikki, hvussu effektivar tær eru undir donskum viðurskiftum.

Merkið verður latið við grundarlagi í orkueffektivitetinum við einum hita uppá sjey stig úti og 20 stigum innandura. Hetta er langt frá miðalhitanum í donsku kyndingartíðini.

– Kundarnir skulu fyrireika seg til nakað, ið líkist eini helvt av effektivitetinum undir donskum viðurskiftum, staðfestir Jørgen K. Nielsen.

Sambært Energistyrelsen eru umleið 75.000 luft/luft-hitapumpur seldar í Danmark.




*Tað er serliga luft-til-luft-hitapumpurnar ið eru væl umtóktar millum manna. Í alt eru 75.000 slíkar í Danmark*